## Sviar vilja samstarv

Hóast fleiri av teimum politisku flokkunum í Svøríki hava vent tí høgrasinnaða flokkinum Sverigesdemokraterna bakið, hava ikki allir veljararnir hjá flokkunum ikki somu áskoðan. Ein nýggj meiningakanning vísir, at 40 prosent av svenska fólkinum halda, at hinir flokkarnir eiga at samstarva við SD, um tað skuldi hent, at flokkurin fær umboð í Ríkisdagin. Samstundis siga 83 prosent av teimum spurdu, at Sverigesdemokraterna er fíggindaliga sinnaður ímóti fremmandafólki.



## Tola ikki jarðskjálvta

Skuldi tað hent, at norski høvuðsstaðurin Oslo verður raktur av einum líka hørðum jarðskjálvta sum í 1904, er stórur vandi fyri, at Stórtingið og kongsborgin fara at rapa. Tað sigur felagið hjá teimum ráðgevandi verkfrøðingunum, RIF. Felagið sigur, at tað eru bara bygningar, sum eru bygdir aftan á 2005, sum eru tryggjaðir ímóti jarðskjálvta. Tað er sjálvandi vónleyst at tryggja allar bygingar í Oslo, sum eru eldri enn frá 2005, og tí ræður um at tryggja teir týdningarmestu, heldur felagið og nevnir millum annað Stórtingið og kongsborgina.



*Norsku jarðfrøðingarnir Wenche Tjelta Johansen, Lene Hauge, Fritjof Riis, Eva Halland og Terje Solbakk leita eftir egnaðum CO2-goymsluplássum undir havbotninum í Norðsjónum*

*Mynd: Aftenposten*

# Nú leita jarðfrøðingarnir eftir vatni og tómum holum í undirgrundini

**Í mong ár hava jarðfrøðingarnir hjá norska oljustýrinum havt til høvuðsuppgávu at leita eftir olju og gassi í undirgrundini undir norska havbotninum. Men nú eru teir settir at leita eft ir vatni og tómum holum í somu undirgrund**

VEÐURLAGS-BROYTINGAR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Jarðfrøðingurin Eva Halland, sum er verkætlanarleiðari hjá oljustýrinum, viðgongur í samrøðu við Aftenposten, at hon og hennara starvsfelagar hava havt eitt sindur ilt við at venja seg við tankan, at tey nú skulu leita eftir vatni heldur enn olju og gassi.

-Hetta er spennandi fyri okkum jarðfrøðingar, men krevur, at vit venda øllum á uppi í høvdinum, sigur hon við blaðið. Í fleiri ár hava hon og starvsfelagarnir kannað undirgrundina undir norska landgrunninum við tí fyri eyga at finna gass og olju. Seismiskar kanningar brúka tey enn, men nú er málið eitt heilt annað.

- Nú leita vit eftir støðum, sum kunnu brúkast til at goyma $CO_2$ í, sigur Eva Halland.

### Fleiri lond áhuga

Teir norsku jarðfrøðingarnir arbeiða saman við starvsbrøðrum hjá British Geological Society í Bretlandi. Í fjør samdust norski olju- og orkumálaráðharrin, Terje Riis-Johansen, og bretski orkumálaráðharrin, Lord Hunt, um eina felags verkætlan, sum hevði til endamáls at kanna, um tað ber til at goyma veðurlagsgassið $CO_2$ undir havbotninum í Norðsjónum. Avtalan bleiv undirskrivað í Bergen í sambandi við ráðstevnuna "Climate Change and technology".

Tað eru ikki bara norðmenn og bretar, sum hava hug at kanna, um undirgrundin undir Norðsjónum kann brúkast til $CO_2$-goymslu. Eva Holland sigur, at fleiri lond hava víst áhuga fyri verkætlanini. Tað ber eisini til at goyma $CO_2$ undir landjørðini, men tað eru fólk ikki serliga fegin um, og tann tankin hevur eisini elvt til fleiri mótmæli. Tí peika fleiri lond á undirgrundina undir Norðsjónum sum ein møguleika.

### Kanna eisini tørvin

Umframt at finna egnað støð til at goyma $CO_2$ í skulu teir norsku og teir bretsku jarðfrøðingarnir kanna, hvussu stórur goymslutørvurin í Evropa verður, og hvussu nógv $CO_2$ londini í Evropa verða før fyri at reinsa.

Eva Halland ásannar, at tað hevði ivaleyst verið best at havt $CO_2$-goymslurnar so nær teimum størstu dálkingarkeldunum sum gjørligt. Men tað hevði kravt, at goymslurnar skuldu vera uppi á landi, og tá mótstøðan ímóti tí er so stór, er Norðsjógvurin eitt áhugavert alternativ, sigur hon.

Í løtuni arbeiða sjey jarðfrøðingar hjá norska oljustýrinum við verkætlanini, og myndugleikarnir í Týsklandi og Niðurlondum hava sagt frá, at teir vilja fegnir hava at vita, hvat úrslit norðmenn og bretar koma til.

Í sambandi við verkætlanina er eisini ætlanin at kanna, um tær rørleiðingar, sum nú verða brúktar til at flyta olju og gass úr Norðsjónum ígjøgnum, kunnu brúkast til at flyta $CO_2$ av landi og niður í undirgrundina undir Norðsjónum seinni.

Ætlanin er, at norsku og bretsku jarðfrøðingarnir skulu lata eina frágreiðing frá sær í januar næsta ár. Hon skal so brúkast sum grundarlag, tá myndugleikarnir í Evropa fara at tingast um og at leggja ætlanir um komandi $CO_2$-goymslur.

*(Kelda: Aftenposten)*